# og politikarin




*Ein av høvuðstreytunum fyri at fara inn í politik er, at tú torir at hava eina meining, og standa við henni, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági*

eru komnar væl ígjøgnum. Tað var ein stór avbjóðing at fara úr lærarastarvinum, sum mær dámdi so væl, og í eitt heilt ókent starv, í heili 4 ár. Men í dag haldi eg ikki, at 4 ár er nóg mikið, tí ætli eg mær at stilla upp aftur. Verði eg afturvald, og sleppi at starvast innan kommunustýring í 4 ár afturat, vil eg fegnast um tað, og síðan takka fyri meg. Haldi ikki, at fólk skulu sita longur í slíkum starvi, tað er sera týdningarmikið, við eini ávísari útskifting, so serliga ungar kreftur sleppa framat. Og so vóni eg, at eg kann brúka nøkur ár í skúlanum aftur, sigur Kirstin.

## Siðvenja, kvinnur og politikkur

Sum lærari og borgarstjóri hevur Kirstin gott innlit í viðurskiftini millum skúla og kommunu. Hon er ikki heit fyri, at kommunurnar skulu yvirtaka meira av skúlaverkinum, sum støðan er nú.

– Um vit høvdu ein homogenan skúla, sum var væl fyri allastaðni í landinum og á øllum økjum, var gamaní, men tað er ikki veruleikin. Vit kunnu taka eitt dømi. Eg havi arbeitt við byrjunarundirvísingini, teimum yngstu klassunum, har tað hava verið ávísir trupulleikar. Nú eru so játtaðir fleiri tímar til byrjunarundirvísingina, men um vit hugsa okkum, at kommunan stóð við læraralønunum, sum ætlanirnar eru, so loyvi eg mær at ivast í, um fleiri tímar vórðu játtaðir. PISA- bólkurin hevur víst á nógvan tørv og neyðugar broytingar, tí er týdningarmikið, at fyrireikingararbeiðið er gjørt, og minimumskrøv eru sett til innihald og karmarnar. Tá hetta fyrireikingararbeiðið er gjørt, er gamaní at yvirtaka skúlan.

Og tá prátið snýr seg um siðvenju, kvinnur og politik, sigur Kirstin seg hoyra til bólkin av "stillu" gentunum.

– Nógvar kvinnur eru afturhaldandi, serliga tá tað kemur til at profilera seg innan politik, eg var sjálv onki við uppá at stilla upp, segði fleiri ferðir nei. Men í dag hevur tú nógvar møguleikar at fáa professionella hjálp til at traðka fram og siga tína meining. Ein av høvuðstreytunum fyri at fara inn í politik er, at tú torir at hava eina meining, og standa við hana.

- Sum lærarir hava vit eisini eina ábyrgd at menna børnini til at taka støðu. Vit hava ofta lyndi til at servera ov nógv fyri teimum, vilja hava tey at gloypa og svølgja, heldur enn at seta teimum spurningin, hvat tey sjálvi halda, og hví. Vit hava kanska tendens til at troyttast av teimum næmingum, sum spyrja nógv. Tí eiga vit at seta okkum spurningin, hvussu vit vilja føra skúla, og hvussu vit kunnu broyta okkara hátt at føra skúla.

- Sum kvinnuligur politikari geri eg ikki nakað skipað arbeiði fyri at fáa aðrar kvinnur við í politik, men eg tosi nógv við tær, sum eg veit hava áhugað fyri politikki, greiði frá, hvat krevst, og hvussu arbeiði fer fram, at tað onki ræðandi er við kommunalpolitikki. Og at byrja við at gerast aktiv í nevndum og ráðum, eitt nú foreldra- og skúlaráðum, kann eisini vera ein ávís skúling. Annars haldi eg, at ábyrgdin liggur hjá teim politisku flokkunum.

## Byrja á ungdómstøði

- Tað vera umráðandi, at byrjað verður á ungdómsstøði, at politisku ungmannafeløgini eisini gera eitt arbeiði fyri at fáa kvinnurnar við, sigur Kirstin. Hon heldur ikki, tað hevði betrað um kvinnuluttøkuna við at fari burtur frá flokksuppstillingini.

- Hóast býráðsarbeiðið nærum ikki er tengt at flokspolitikki, bert í onkrum einstøkum førum, so haldi tað hevði verið sera trupult at komi uttanum. Kann t.d. eisini vera gott hjá borgarunum at vita, hvørjar grundhugsjónir tú hevur. Tað eru kommunur, sum ikki hava floksuppstilling, men kvinnuluttøkan har ikki betur fyri tað. Spurd, um hon sær mun á Vágs kommunu, har bæði borgarstjóri og varðaborgarstjóri eru kvinnur, og øðrum kommunum, har menn eru í sessunum, sigur hon, at sjálv dugur hon ikki at finna nakran sjónligan mun, fyri bæði kynini